# Fyrstu heilsurøktararnir fingið prógv



*Hetta eru teir 23 heilsurøktararnir, sum eru teir fyrstu, sum eru klaktir í Føroyum. Frá vinstru eru tey Elsa Maria Fláaberg, Nancy Johannesen, Anna Sjúrðardóttir, Heini Larsen, Krist-Bjørg Olsen, Malfrid Svabo Joensen, Linda Syderbø, Marita Poulsen, Johanna Sigurheim, Selma Franksdóttir, Asta Borgarlíð, Elsa Jacobsen, Kathrina Poulsen, Stefan Nordendal, Marita Krosstein, Tony í Lon, Sunrid Olsen, Eghild Poulsen, Eyðna Poulsen, Elin Jacobsen, Heidi Thomsen, Hanna Klettskarð í Kongstovu, Olea Johannesen*

**Í gjár var søguligur dagur í Suðuroy, tí tá fingu teir fyrstu heilsufrøðingarnir, sum eruklaktir í Føroyum, prógv**

PRÓGV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár var hátíðarhald í skúlanum í Trongisvági. Og tað var eisini nakað at hátíðarhalda, tí tá fingu teir fyrstu heilsurøktararnir, sum eru klaktir í Føroyum, prógvini handað.

Hetta vóru næmingar, ið byrjaðu á Almanna- og heilsuskúlanum í Suðuroy í 2006 og teir vóru 23 í tali, sum fingu prógv í gjár, 21 konufólk og tvey mannfólk.

Á hátíðarhaldinum fortaldi Johanna Køtlum, forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelagnum, at hetta er ein sera góð útbúgving sum kann brúkast víða og á nógvum økjum.

- Í Danmark hevur tað tikið nógv ár hjá heilsurøktarunum at finna teirra samleika í fakinum. Tað verður kanska ongantíð heilt greitt, hvussu fakbólkurin skal brúkast, men tað verður meira og meira greitt hvussu fakbólkurin kann brúkast, segði hon.

Hon segði, at eisini í Føroyum, arbeiða tey støðugt við at finna teirra fakliga samleika og at vera okkara egni fakbólkur við serligum sereyðkenni.

- Heilsurøktara útbúgvingin er ein víttfevnandi útbúgving, í fyribyrging, aktivering, viðgerð og røkt. Sjálvt um útbúgvingin er í slekt við aðrar útbúgvingar á hesum øki, er hon uppbygt á ein heilt annan hátt.

- Navnið sigur nógv um hvat ein heilsurøktari ger, tí ein høvuðsuppgáva er at røkta heilsuna við umsorgan, aktiverandi tiltøkum, pedagogikki, røkt og viðgerð har borgarin er, antin í egnum heimi, á sjúkrahúsi ella á stovni.

- Hetta kann gerast við at taka borgarin við í einum og hvørjum, at stíla ímóti at borgarin sleppur at vera sum longst í egnum heimi, at stytta um innleggingartíðina á sjúkrahúsum og við at leggja størri áherðslu á fyribyrging.

Johanna Køtlum segði, at tað er ongin føst uppskrift upp á, hvussu heilsurøktarar skulu arbeiða.

- Hóast tað kann vera ørkymlandi, hevði tað eisini avmarka møguleikarnar at nýta heilsurøktarnar á eins góðan hátt, sum tað verður gjørt nú.

- Tí skal tað heldur takast sum ein avbjóðing, segði hon og hon legði afturat, at við teirri framgongd, sum hevur verið í fakinum, verður spennandi at vita hvat øki heilsurøktarin fer at røkja í framtíðini.

## Dagurin

**23. februar. Papias,** deyður umleið ár 150. Var biskupur í Hierapolis í Frýgiu í Lítluásiu. Sigst at hava havt samband við ápostulin Filippus.

**24. februar. Leypársmessa.** Fjórða hvørt ár varð ein dagur taldur afturat í februar mánaði, so at hann fekk 29 dagar. Hetta var ein fyriskipan í tíðarrokning okkara, sum skuldi fáa ár og dagar at samsvara við gongd sólarinnar. Hann var vanliga hildin 24. februar, men 25. februar, tá ið leypár var. Niels Winther doyði hendan dagin í 1892.

**25. Februar. Victorinus,** deyður umleið ár 250. Halgisøgurnar eru ymiskar á máli. Summar siga, at hann varð tikin av døgum í Júdea, aðrar í Egyptalandi og uppaftur aðrar í Róm. Sama navnið sum Victor: sigurharri. Johan Henrik Schrøder varð føddur hendan dagin í 1771.

# Martina Kruse 90 ár



Í dag 22. februar verður Martina Kruse av Eiði 90 ár. Martina er dóttir Marsonnu og Nikkel Nielsen. Henda heilsan verður skrivað vegna okkum hjá Nikkel, beiggja Martinu. Hjá okkum var hon altíð Tinafastur.

Tað hava altíð verið sera góð viðurskifti millum okkara hús. Tinafastur hevur alla sína tíð verið ein framúr og skilagóð kvinna. Hon giftist við Jens Tonny Kruse, sum eisini var av Eiði. Tey fingu børnini Nikkel Martin, Petur, Súsannu og Anfinn, sum øll búgva á Eiði. Hetta var eitt hús, har foreldrini av øllum alvi stuðlaðu hvørjum øðrum. Tí var tað ein smeitur fyri Tinufastur, tá ið Jens Tonny knappliga doyði fyri nakað nógvum árum síðani.

Tað var nógv samband millum húsini. Vit, Tinafastur og Idafastur høvdu kúgv saman. Vit hoyggjaðu í felag. Hvørt húsið hevði kúnna triðja hvønn dag við mjólking og annars ambæting av kúnni. Hetta gjørdi sítt til felagsskapin millum húsini.

Tað hevur allar dagar verið gott samband og góð viðurskifti millum systkini. Tey komu javnan á gátt hjá hvørjum øðrum. Tað var altíð ein stuttleiki at koma inn á gólvið hjá Tinufastur. Hon var so altfevnandi góð við øll, og familjukær hevur hon verið, so tað forslær. Hjá okkum, sum eru komin afturat familjuni seinni, hevur tað eisini verið ein fragd at koma at kenna Martinu, og nógvar hugnaligar løtur hava vit havt saman, ta tíð tað var. Tá vit komu inn til Tinufastur merkist, at hon hevði ektaðan áhuga fyri okkum. Hon hevði eisini eitt positivt lyndi og dugdi at síggja tað góða í øllum.

Tinafastur helt sunnudagsskúla í missiónshúsinum Karmel í mong ár. Enn minnast vit, hvussu væl hon dugdi at siga frá teimum bíbilsku søgunum. Hetta var nakað vit gleddu okkum til hvønn sunnudag.

Tinafastur hevur nú í fleiri ár verið minnisveik og hevur búð á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík. Men fyri tað verður Tinafastur ikki gloymd. Tí skal hon fáa hesa heilsan frá okkum á sínum 90 ára degi. Vit ynskja henni hjartaliga tillukku og takka fyri alt gott og fyri tey minni, vit hava um hana.

**Vit hjá Nikkel**